# HEILSANIR



Tann 27. fyllir hesin runt. Í Funningsfirði hann býr. Vit siga bara hjartaliga tillukku og alt gott í framtíðini
**Vit**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 24 ára føðingardegnum. Eg elski teg.
**Heilsan Andrias**



**Góða omman**
Hjartaliga tillukku við degnum 27. jan. Eisini ein heilsan til abban. Takk fyri at tykur eru so góð við meg.
**Heilsan Johanna**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við teimum 50 árunum. Vónandi fært tú ein góðan dag. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Heilsan børnini við familju**



**Góða Sólgerð**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum.
**Ynskja mamma og pápi**



**Góði fitti Heini**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi. Gud signi framtíð tína.
**Ynskja mamma og pápi**



**Góði fitti Petur Ovi**
Lukku og gleði á tínum 4 ára degi.
**Heilsan omma, abbi og Donna**



**Góða elskaða dóttir**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Góða eydnu í framtíðini.
**Ynskir pápi**



*Grannin her hjá*
*okkum fyllir 30x2.*
*Bóndi er hann*
*Fisk tað sker hann*
*lagið er gott*
*Sjálvt um hárið*
*er grátt.*
Hjartaliga tillukku
**Maikel**

## Framsýning um hjálpararbeiði

**Reyði Krossur Føroya skipar fyri framsýning við málningum og øðrum tilfari leygardagin eftir kyndilsmessu í hølunum hjá Tøting í Syðrugøtu**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Á framsýningini fer felagið at sýna fram tilfar, sum vísir neyðhjálpararbeiði ymsa staðni úr heiminum, har vanlukkur av ymsum slag hava rakt.

Við skjølum og myndum verður millum annað víst á, hvussu felagsskapurin gav eina hjálpandi hánd undir øðrum heimsbardaga, eins og aðrar hendingar sjálvandi eisini verða á skránni.

Hartil verður eisini kunnandi tilfar um fyrstuhjálp at fáa.

Møguleiki er eisini at ogna sær onkrar av málningunum, sum verða sýndir fram.

## Nýtt lokalfelag hjá Miðflokkinum

**Á stovnandi fundi tann 25-01-2005, á Sjómansheiminum í Runavík, varð samtykt at seta á stovn lokalfelag Miðfloksins í Eysturoynni**

LOKALFELAG
*tíðindaskriv*

Endamál felagsins er at fremja áhugamál Miðfloksins, bæði lokalt í Eysturoynni og í landspolitiska arbeiðinum.

Í fyrstu nevndina vórðu vald: Kaj Otto Frederiksberg - Strendur, Poul Johan Djurhuus - Glyvrar, Leif Høj - Saltangará, Maj í Túni - Toftir og Jeffrei Johannesen - Lambi. Nevndi skipar seg sjálv. Arni Abrahamsen bleiv valdur sum skrivari.

Nevndin fer í næstum undir at skriva endamálsorðing og reglugerð fyri lokalfelagið, sum skal góðkennast á næsta aðalfundi felagsins.

Sum eitt lokalfelag kann felagið vera eitt millumlið millum einstøku limirnar og stuðlarnar hjá flokkinum í Eysturoynni, og floksleiðsluna og politisku umboð floksins, soleiðis at lokalu sjónarmiðini verða betri hoyrd. Tað er eisini munandi lættari at bera eitt politiskt arbeiði í økinum, við at hava eina lokala nevnd. Nevndin væntar at lokalfelag Miðfloksins í Eysturoynni fer at vera við til at menna og styrkja flokkin.

## DJ-show í Hvalba

Leygarkvøldið verður stórt DJ-SHOW í Roynhøllini í Hvalba. Tað plagar at verða rættiligt lív í, tá ið DJ-showið við teirra manning kemur til bygdina. Hesaferð verða tveir DJ´arar á pallinum í senn, og tað eru teir báðir, Høgni Thomsen og Magnus Debes, sum í felag fara at spæla nýggj og eldri løg. Bussur koyrir til og frá Roynhøllina.

**-jm**

30,- kr. Sosialurin
**Heilsanir**
**5 ferðir um vikuna**

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«